# ÁRSFRÁGREIÐING

April 2022



SJÓVINNUFELAGIÐ

# Innihaldsyvirlit

Yvirlit yvir limirnar ........ 4
Frágreiðing frá nevndini ........ 5
Endamál felagsins ........ 7
Nevndin í Sjóvinnufelagnum ........ 8
Í nevndini sita ........ 8
Limatal í Sjóvinnufelagnum ........ 8
Limagjald í Sjóvinnufelagnum ........ 8
Árið ið fór ........ 9
Tiltøk mótvegis larmi frá skipum ........ 9
Avrigging av oljuvirksemi: Nýggjur vinnumøguleiki í Føroyum ........ 9
Handilsferðir og messur ........ 11
Vakstrarforum ........ 11
Avleiðingarnar av havnastongsli mótvegis russum ........ 11
Viðtøkur ........ 12
Viðtøkur Sjóvinnufelagsins ........ 12

# Yvirlit yvir limirnar

Akraberg FD 10 P/F
Articon P/F
Atlantic Airways
Atlantic Fair
Atlantic Supply Base
Damfar P/F
Faroe Offshore Services P/F
Faroe Ship P/f
Kemilux
KJ-Hydraulik
KSS
MAGN
Meginfelag Búnaðarmanna L/F
PAM Offshore service
Poul Hansen P/f
Radioservice P/F
Runavíkar Havn
Samskip P/f
Skansi Offshore P/f
Thor P/F
Tórshavnar Havn
Vest Pack P/F
Vinnuháskúlin
Vónin P/F

# Frágreiðing frá nevndini

Nú er eitt ár farið síðan uppskot varð lagt fyri aðalfundin, um at broyta navnið á Oljuvinnufelgnum til Sjóvinnufelagið og samstundis víðka viðtøkurnar, soleiðis at endamálið við felagnum gjørdist breiðari.

Grundgevingarnar fyri at broyta navn og at víðka endamálið, vóru millum aðrar, at hóast einki oljuvirksemi hevði verið á føroyska landgrunninum seinastu nógvu árini, og lítil útlit vóru fyri nøkrum virksemi komandi árini, so hevði føroysk vinna fingið nógvar royndar sum tænastuveitari til frálandavinnuna síðan aldarskifti 2000, tá Oljuvinnufelagið varð stovnað. Her eru tí nógv áhugamál at savnast um hjá føroysku vinnuni á hesum øki, sum ikki muga fara fyri skeyti.

Tað kennist nú eitt sindur løgið at hyggja aftur á hesar grundgevingarnar fyri at broyta navnið á oljuvinnufelagnum, tí eftir at Russland gjørdu innrás í Ukraina, er breið semja millum evropeiskar politikarar um, at londini í Evropa skulu gera seg minni bundin av orku úr Russlandi, serliga gassi, so skjótt hetta á nakran hátt kann lata seg gera.

Tí er støðan at útvinna olju og allar aðrar orkukeldur í vesturheiminum nógv broytt hesar seinastu vikurnar. Okkurt stórt altjóða oljufelag hevði lagt ætlanir um at útvinna olju nærhendis okkum á hillini, men nú eru ætlanirnar tiknar fram aftur.

Útlitini fyri oljuvirksemi um okkara leiðir eru framvegis óviss, men tey eru nógv øðrvísi nú, enn tey vóru fyri einum ári síðan, og tey fara helst at broytast skjótt hesa nærmastu tíðina.

Her er annars nakað av tí, sum hevur verið á skránni hjá Sjóvinnufelagnum hetta seinasta árið.

Ein kommunal reglugerð fyri óljóð frá skipum er nú sett í verk og verður í løtuni royndarkoyrd. Sjóvinnufelagið var á nøkrum fundum við kommunur og aðrar almennar myndugleikar, áðrenn henda reglugerðin varð sett í verk. Hvussu endaligu reglurnar fara at verða, vita vit ikki rættiliga enn, men Sjóvinnufelagið fylgir væl við gongdini, soleiðis at vit sum frá líður koma til eina felagsloysn, sum allir partar kunnu taka undir við.

Kann avrigging av oljuvirksemi geva vinnuligar møguleikar í Føroyum? Hetta er spurningurin, sum ein kanning nú skal royna at finna svarið uppá.

Tað er Sjóvinnufelagið, ið hevur tikið stig til kanningina, sum Vinnuframi hevur avgjørt at stuðla. Sjóvinnufelagið hevur heitt á fyritøkuna FOÍB (Føroya Orkuídnaðarbólk), um at gera kanningina.

Sjóvinnufelagið heldur tað vera rætt at kanna allar vinnumøguleikar í Føroyum. Avrigging ella “Decommissioning”, sum er altjóða heitið fyri at burturbeina gamla oljuútgerð og undirstøðukervi sum t.d. rørleiðingar og oljupallar, ið hava tænt sína tíð, kann møguliga vera grundarlag fyri vinnuligum virksemi í Føroyum. Orsøkin til at Sjóvinnufelagið hevur heitt á FOÍB um at standa fyri kanningini er tann, at hetta felagið hevur drúgvar royndir á økinum og hevur ognað sær stóra vitan á oljuøkinum sum heild. Ætlanin er, at kanningin skal vera liðug í seinnu helvt av 2022.

Sjóvinnufelagið hevur havt fund við føroyska sendimannin í Kina og føroysku sendikvinnuna í London, um møguleikarnar fyri handilsferðum og messum, men tað er ikki komið nógv víðari við hesum enn. Kina er framvegis hart rakt av koronaavmarkingum, og tí er tað rættiliga trupult at fara til Kina ella aðrastaðni í Asiu undir verandi umsøtðum.

Ein størri verkætlan hevur í longri tíð koyrt undir løgmansskrivstovuni, sum nevndist “Vakstrarforum”. Tað hava verið seks undirbólkur undir hesi verkætlanini, og Sjóvinnufelagið hevur verið hoyringspartur hjá tí eina bólkinum, ið kallast “Veitaravinnubólkurin”.

Arbeiðsbólkurin er liðugur við síni tilmæli, men hevur ikki latið frágreiðingin frá sær enn. Sum skilst, so hevur arbeiðsbólkurin tikið viðmerkingarnar frá Sjóvinnufelagnum til sín, har høvuðs-tilmælið er, at føroysk sjóvinna fær eitt alment umboðsfólk (ein almennan lobbyist) uttanlands at marknaðarføra føroyska sjóvinnu.

Hvussu hetta ítøkiliga skal gerast og hvat abeiðsbólkurin fer at mæla til í hesum sambandi, er tó ikki alment enn.

Eitt av uppskotunum til tiltøk mótvegis russum eftir innrásina í Ukraina er at steingja evropeiskar havnir fyri russum.

Hetta hevur ikki rakt okkum enn, men Sjóvinnufelagið hevur, saman við øðrum vinnugreinafeløgum í Vinnuhúsinum, kannað, hvørjar avleiðingar ein føroyskur havnastongsul, mótvegis russiskum skipum, kemur at merkja fyri føroyska sjóvinnu.

Niðurstøðan av kanningini er, at tað kemur at kosta føroyskari sjóvinnu góðar 400 mió. kr. árliga í mistum umsetningi at steingja føroyskar havnir mótvegis russum. Hetta er við verandi oljuprísum, og úrslitið av kanningini skal sostatt takast við neyðugum fyrivarni, tí oljuprísirnir eru høgir í løtuni og broytast alla tíðina.

**Tórshavn, tann 20. apríl 2022**

**Leif Hovgaard**
formaður

# Endamál felagsins

Sjóvinnufelagið er vinnugreinafelag, ið umboðar seráhugamálini hjá føroyskum fyritøkum, ið selja vørur og tænastur til vinnu á sjóøki nærhendis Føroyum umframt Arktis.

Sjóvinnufelagið strembar eftir at veita limum sínum best møguliga tænastu, samsvarandi teimum raðfestingum, sum limirnir í Sjóvinnufelagnum seta á skránna.

Tað eru tí limirnir í Sjóvinnufelagnum, ið gera av, hvussu felagið skal ávirka gongdina og menningina av hesum vinnum í Føroyum.

Føroyar eru eitt nýmótans samfelag mitt í Atlantshavinum við góðum samskiftis, ferða- og flutningssambandið til evropeiska meginlandið. Tí eru Føroyar kappingarførar við okkara nærmastu grannalond, tá ið tað snýr seg um at veita alskyns tænastur til sjóvinnuna um okkara leiðir.

Fyri at menna inntøkugrundarlagið hjá limunum og føroyska samfelagnum sum heild, fer Sjóvinnufelagið aktivt at virka fyri øktum vinnumøguleikum, bæði í Føroyum og uttanlands.

Felagið sær stórar møguleikar hjá bæði tænastu- og framleiðsluvinnunum komandi árini. Oljuvirksemið fer at verða nærhendis føroyska markinum fleiri ár frameftir, samstundis sum ætlanir eru um stórar verkætlanir við vindmyllulundum á sjónum, umframt frálandavinnu yvirhøvur.

Tað fer somuleiðis at verða nógv skipaferðsla framvið Føroyum komandi árini. Hesi skipini skulu viðlíkahaldast, umvælast, proviantera, bunkra og skifta manning. Her hava føroyskar tænastu- og framleiðslufyritøku gyltar møguleikar at bjóða seg fram, mitt í ferðslumeldrinum í Atlantshavinum.

Sjóvinnufelagið fer eisini aktivt at fylgja vinnumøguleikunum í arktiska økinum, og virka fyri, at føroyskar fyritøkur fáa møguleika at verða við í hesum nýggja og spennandi øki.

Ein onnur týdningarmikil uppgáva hjá Sjóvinnufeagnum er at umboða limir sínar mótvegis politisku skipanini og almennu myndugleikunum, soleiðis at limir felagsins fáa best møguligar karmar at virka innanfyri. Hetta ger Sjóvinnufelagið m.a. við viðmerkingum um støðu sína, tá ið lógir og reglur, sum kunnu ávirka limirnar í Sjóvinnufelagnum, verða fyrireikaðar.

Sjóvinnufelagið fylgir við galdandi lógum og reglum fyri limir sínar. Endamálið við hesum er at vísa politisku skipanini á, hvørjar lógir og reglur treingja til at verða dagførdar og broyttar, soleiðis at virksemið hjá limum felagsins hevur kappingarførar og smidligar karmar av virka innanfyri.

# Nevndin í Sjóvinnufelagnum



*Frá vinstru: Leif Hovgaard, Anja Jacobsen, Christian Danielsen, Eli Lassen og Jannis Moraites*

## Í nevndini sita

- Leif Hovgaard, formaður
- Eli Lassen, næstformaður
- Anja Jacobsen, nevndarlimur
- Christian Danielsen, nevndarlimur
- Jannis Moraites, nevndarlimur

## Limatal í Sjóvinnufelagnum

Í løtuni eru 24 limir í Sjóvinnufelagnum.

## Limagjald í Sjóvinnufelagnum

Limagjaldið í Sjóvinnufelagnum er 2.000 kr. um árið.

# Árið ið fór

Niðanfyri er stutt frágreiðing um ymsikt, sum hevur verið á skránni í Sjóvinnufelgnum hetta farna árið.

## Tiltøk mótvegis larmi frá skipum

Sjóvinnufelagið gjørdi alt fyri eitt vart við seg, tá ið tað frættist í fjølmiðlunum, at fyrrverandi landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, Helgi Abrahamsen, hevði sett í gongd arbeiði at áseta markvirði fyri óljóð frá skipum í føroyskum havnum.

Sjóvinnufelagið tekur sjálvandi undir við og heldur at vinna og myndugleikar eiga at gera alt fyri at minka um óneyðugan larm og ampa frá skipum í føroyskum havnum, men hetta arbeiðið má gerast í samráð við vinnuna, soleiðis at myndugleikar ikki kroysta reglugerðir niður yvir vinnuna, sum eru ógjørligar hjá vinnuni at umsita.

Sjóvinnufelagið var tí á nøkrum fundum við kommunur og aðrar almennar myndugleikar, áðrenn reglugerðin, sum kommunurnar nú royna, varð sett í verk.

Hvussu endaligur reglurnar fara at verða, vita vit ikki rættiliga enn, men Sjóvinnufelagið fylgir væl við gongdini, soleiðis at vit sum frá líður koma til eina felagsloysn, sum allir partar kunnu taka undir við.

## Avrigging av oljuvirksemi: Nýggjur vinnumøguleiki í Føroyum

Kann avrigging av oljuvirksemi geva vinnuligar møguleikar í Føroyum? Hetta er spurningurin, sum ein kanning nú skal royna at finna svarið uppá.



*Jan Muller, stjóri í Foib og Leif Hovgaard, formaður í Sjóvinnufelagnum*

Tað er Sjóvinnufelagið, ið hevur tikið stig til kanningina, sum Vinnuframi hevur avgjørt at stuðla. Sjóvinnufelagið hevur heitt á fyritøkuna FOÍB, Føroya Olju-ídnaðarbólkur, um at gera kanningina.

Sjóvinnufelagið heldur tað vera rætt at kanna allar vinnumøguleikar í Føroyum. Avrigging ella “Decommissioning”, sum er altjóða heitið fyri at burturbeina gamla oljuútgerð og undirstøðukervi sum t.d. rørleiðingar og oljupallar, ið hava tænt sína tíð, kann møguliga vera grundarlag fyri vinnuligum virksemi í Føroyum.

Í dag hava flestu av okkara grannalondum, tvs. Bretland, Norra og Danmark, tikið til sín henda møguleika, sum gevur bæði nógv arbeiðspláss og inntøkur til samfeløgini.

Nú oljuvinnan í Norðsjónum hevur umleið fimti ár á baki, eru nógvar av keldunum við at tømast, og tí er ikki brúk fyri øllum pallunum longur.

Mett verður, at avrigging í oljuvinnuni fer at umseta fyri meira enn 150 mia. kr. komandi tíggju ára skeiðið.

Tá oljufeløg á sinni gjørdu avtalur um at fara undir útbyggingar og framleiðslu, fylgdi eisini við eitt krav um at rudda upp eftir sær, tá framleiðslan endaði.

Sjóvinnufelagið heldur, at tað kundi verið áhugavert at kanna, um eisini Føroyar kunnu gerast partur av hesum virksemi, ið hevur til endamál at varðveita eina reina og ódálkaða náttúru og umhvørvi, um somu tíð sum nærum alt tilfarið frá gomlum pallum og útbúnaði á havbotninum kann endurnýtast.

Við øðrum orðum snýr vinnan seg um at taka niður, beina burtur og endurvinna mest møguligt av pallum og aðrari útgerð til frama fyri burðardygd og umhvørvið.

Ein orsøk til at Sjóvinnufelagið heldur, at slík kanning kann vera áhugaverd at gera er tann, at næsti granni Føroya, nevniliga Hetland, longu so smátt er farið undir hetta virksemið. Hvat kunnu vit læra av teimum eins og hinum londunum kring Norðsjógvin?

Tað skal vera sagt, at avrigging av pallum og øðrum útbúnaði er bert ein lítil partur av allari arbeiðsupggávuni. Størsti parturin av arbeiðinum verður gjørdur, áðrenn sjálv avriggingin fer fram. Hann inniber verkfrøðingavirksemi til havs, stýring og umsiting av arbeiðinum, lógararbeiði og samskipan av flutningi við bæði hjálparskipum og tyrlum.

Men er hetta í heila tikið ein vinna, sum føroyingar ynskja at fara í holt við? Og hóast arbeiði er til nærum allar hendur í Føroyum í dag, so er torført at vita, hvussu støðan verður um nøkur ár. Kann avrigging kanska skapa vinnuligt virksemi í Føroyum, tá tað eitt nú verður longri millum størri verkætlaninar í t.d. byggivinnuni?

Orsøkin til at Sjóvinnufelagið hevur heitt á FOÍB um at standa fyri kanningini er tann, at hetta felagið hevur drúgvar royndir á økinum og hevur ognað sær stóra vitan á oljuøkinum sum heild.

Ætlanin er, at kanningin skal vera liðug í seinnu helvt av 2022.

## Handilsferðir og messur

Sjóvinnufelagið hevur havt fund við føroyska sendimannin í Kina og føroysku sendikvinnuna í London, um møguleikarnar fyri handilsferðum og messum, men tað er ikki komið nógv víðari við hesum enn. Kina er framvegis hart rakt av koronaavmarkingum, og tí er tað rættiliga trupult at fara til Kina ella aðrastaðni Asiu undir verandi umsøtðum.

## Vakstrarforum

Ein størri verkætlan hevur í longri tíð koyrt undir løgmansskrivstovuni, sum nevndist “Vakstrarforum”. Tað hava verið seks undirbólkur undir hesi verkætlanini, og Sjóvinnufelagið hevur verið hoyringspartur hjá tí eina bólkinum, ið kallast “Veitaravinnubólkurin”.

Arbeiðssetningurin hjá Veitaravinnubólkinum var sojóðandi:

> “Bólkurin skal vísa á vakstrarmøguleikar í maritimu tænastu-vinnunum. Viðkomandi er bæði at lýsa verandi útflutning av vørum og tænastum, og ótroyttar møguleikar fyri øktari samvirkan í vinnuni. Hugsað verður m.a. um nýggj vinnuøki innan skipasmíð og grønar orkuútbyggingar, niðurtøku av gamlari tøkni, tænastur til ferðsluna í Norðuratlantshavi v.m. Yvirhøvur møguleikar, har førleikar í vinnuni og landafrøðiliga støða Føroya verða gagnnýtt til fulnar.”

Arbeiðsbólkurin er liðugur við síni tilmæli, men hevur ikki latið frágreiðingin frá sær enn. Sum skilst, so hevur arbeiðsbólkurin tikið viðmerkingarnar frá Sjóvinnufelagnum til sín, har høvuðstilmælið er, at føroysk sjóvinna fær eitt alment umboðsfólk uttanlands at marknaðarføra føroyska sjóvinnu.

Hvussu hetta ítøkiliga skal gerast og hvat abeiðsbólkurin fer at mæla til í hesum sambandi, er tó ikki alment enn.

## Avleiðingarnar av havnastongsli mótvegis russum

Eitt av uppskotunum til tiltøk mótvegis russum eftir innrásina í Ukraina er at steingja evropeiskar havnir fyri russum.

Hetta hevur ikki rakt okkum enn, men Sjóvinnufelagið hevur, saman við øðrum vinnugreinafeløgum í Vinnuhúsinum, kannað, hvørjar avleiðingar ein føroyskur havnastongsul, mótvegis russiskum skipum, kemur at merkja fyri føroyska sjóvinnu.

Niðurstøðan av kanningini er, at tað kemur at kosta føroyskari sjóvinnu góðar 400 mió. kr. árliga í mistum umsetningi at steingja føroyskar havnir mótvegis russum. Hetta er við verandi oljuprísum, og úrslitið av kanningini skal sostatt takast við neyðugum fyrivarni, tí oljuprísirnir eru høgir í løtuni og broytast alla tíðina.

# Viðtøkur

## Viðtøkur Sjóvinnufelagsins

**Lóg**
**fyri**
**Sjóvinnufelagið**

**§ 1**

**Navn, heimstaður og endamál**

**Stk. 1.** Navn felagsins er Sjóvinnufelagið (á enskum Faroe Maritime Industries Association)

Heimstaður felagsins er Tórshavnar kommuna.

**Stk. 2.** Endamál felagsins er at savna allar føroyskar fyritøkur, ið veita tænastur til vinnur á sjónum í og nærhendis føroyskum øki umframt Arktis. Í virki sínum skal felagið skipa fyri felags menning av hesum virksemi, bæði fyri einstøku fyritøkurnar og kørmunum fyritøkurnar virka innanfyri. Millum limirnar skal felagið stuðla undir samskifti og førleikamenning, og úteftir virka sum felags málgagn mótvegis myndugleikum, stovnum og aðrari vinnu.

**§ 2**

**Limaviðurskifti**

**Stk. 1.** Virkir kunnu gerast limir í felagnum við skrivliga at venda sær til felagið, og um nevndin játtar teimum limaskap.

**Stk. 2.** Útliman og burturvísing
a. Siga seg burtur úr felagnum kann eingin uttan við innskrivaðum brævi til felagið og við 6 mánaða ávaring.
b. Tvey árs eftirstøða inniber, at limur av sær sjálvum missir limaskapin. Áðrenn hann verður limur aftur, skal hann gjalda alla skuld sína til felagið.

**Stk. 3.** Limagjald
a. Árliga limagjaldið verður ásett á ársaðalfundinum. Fult limagjald verður eisini goldið fyri innlimingarárið. Inngoldið limagjald verður nýtt til rakstur felagsins í tann mun, sum nevndin, ið stendur aðalfundinum til svars, heldur at tørvur er á.

b. Skuldi felagið havt tørv á meira peningi fyri at fremja serlig mál, so kann nevndin royna at útvega henda pening við tilskotum frá limunum. Eisini kann aðalfundurin, til útvegan av slíkum peningi, álíkna limunum eykagjald á hvørjum kalendarári.
c. Limagjald er gjaldkomið 10 dagar eftir ársbyrjan.

**Stk. 4.** Rættindi og skyldir limanna.
a. Hvør limur hevur skyldu til at halda felagsins lógir. Tær avgerðir, ið aðalfundurin ella nevndin taka, eru bindandi fyri limirnar. Um limur ikki vil ganga undir eina tílíka avgerð, kann nevndin koyra hann úr felagnum uttan ávaring, og kann hann ikki gerast limur aftur tey næstu tvey árini. Áðrenn hann verður limur aftur, skal hann gjalda alla skuld sína til felagið.
b. Avgerð nevndarinnar kann av einum limi kærast fyri limafund, sum tekur endaliga avgerð.

**§ 3**

**Aðalfundur felagsins**

**Stk. 1.** Aðalfundurin hevur hægsta ræði í felagnum.

**Stk. 2.** Tann vanligi aðalfundurin verður hildin eina ferð um árið - ikki seinni enn 1. mai.

Nevndin ásetir tíð og stað fyri aðalfundin, sum verður kunngjørdur við minst 14 daga ávaring við skrivi til limirnar.

**Stk. 3.** Eykaaðalfundurin kann verða hildin, tá ið nevndin heldur tað verða neyðugt, ella tá ið limir, ið umboða minst 1/5 av atkvøðunum, krevja tað. Nevndin ásetir tíð og stað fyri eykaaðalfundin, sum verður kunngjørdur við minst 7 daga ávaring.

**Stk. 4.** Dagsskráin á vanliga aðalfundinum er henda:
1. Framløga av limalista.
2. Frásøgn nevndarinnar frá farna ári.
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi frá farna ári.
4. Val av nevnd.
5. Val av skrásettum ella góðkendum grannskoðara.
6. Áseting av limagjaldi fyri komandi árið.
7. Ymiskt.

Allar samtyktir á aðalfundinum skulu verða skrivaðar í gerðabókina.

Um ikki formaðurin leiðir fundin, kann aðalfundurin velja ein fundarstjóra.

**Stk. 5.** Uppskot frá limunum til viðgerðar á tí vanliga aðalfundinum skulu latast felagnum í seinasta lagi 14 dagar áðrenn aðalfundin, skulu tey verða tikin við á dagsskránna fyri fundin.

**Stk. 6.** Hvør limur hevur eina atkvøðu. Eitt árs eftirstøða inniber miss av atkvøðurætti.

Persónur kann bara møta fyri lim við skrivligari fulltrú frá avvarðandi limi.

**Stk. 7.** Øll mál, felagnum viðvíkjandi, kunnu viðgerast á vanligum aðal- ella eykaaðalfundi. Lógarbroyting kann bert fara fram, tá ið uppskot um lógarbroytingina er sett fram frammanundan, og uppskotið er lýst í kunngerðini um aðalfundin.

Har ikki annað er tilskilað í lógunum, verða allar avgerðir samtyktar við vanligum meiriluta.

**§ 4**

**Nevnd felagsins**

**Stk. 1.** Nevndin tekur sær av áhugamálum felagsins, hevur fyrisæti við sjálvum felagnum og ansar eftir, at felagsins lógir og samtyktir verða hildnar.

**Stk. 2.** Í nevndini sita 5 limir, ið aðalfundurin velur millum felagslimirnar. Fyrsta árið fara 2 frá, og næsta árið fara 3 frá. Hvørjir teir 2 fyrstu eru, sum fara frá, ger nevndin av.

Umframt nevndarlimir verður valdur 1 tiltakslimur hvørt ár. Nevndin velur sjálv formann sín og næstformann. Nevndin kann seta kassameistara og skrivara.

**Stk. 3.** Á hvørjum nevndarfundi verður gerðabók førd, sum verður undirskrivað av hjástøddu nevndarlimum.

**Stk. 4.** Nevndin er viðtøkufør, um 3 limir eru á fundi. Á nevndarfundi verða øll mál at gera av við vanligum atkvøðumeiriluta. Stendur á jøvnum, ræður atkvøða formansins.

**Stk. 5.** Nevndin hevur heimild til at tekna lutapening ella partapening í øðrum feløgum eftir góðkenning frá aðalfundinum.

**§ 5**

**Roknskapur og grannskoðan**

**Stk. 1.** Felagsins roknskaparár er álmanakkaárið.

**Stk. 2.** Roknskapur verður grannskoðaður av felagsins roknskapargrannskoðara. Roknskapurin fyri árið skal vera uppgjørdur og grannskoðaður áðrenn ársaðalfundin.

**§ 6**

**Ábyrgdarviðurskifti**

**Stk. 1.** Felagið verður bundið við undirskrift formansins ella honum, ið er í hansara stað, ella tveimum nevndarlimum saman. Til dagligu umsitingina av sjálvum felagnum kann nevndin geva skrivaranum fulltrú.

**Stk. 2.** Tekur felagið lán ella veðsetir ogn, mugu minst 2/3 av nevndarlimunum skriva undir.

**Stk. 3.** Limir felagsins ábyrgdast á ongan hátt persónliga fyri fíggjarligu skyldum felagsins.

**§ 7**

**Broytingar í viðtøkum og avtøka felagsins**

**Stk. 1.** Til at broyta felagslógirnar krevst, at í minsta lagi 2/3 av teimum greiddu atkvøðunum eru fyri uppskotinum, og at helvtin av øllum limunum hava atkvøtt fyri.

Møta ikki nóg nógvir limir á vanliga aðalfundinum, har uppskot er frammi um at broyta lógirnar ella aðra samtykt, ið krevur at í minsta lagi helvtin av øllum, ið eiga atkvøðurætt, skulu atkvøða fyri, kann samtykt verða gjørd um at kalla saman til eykaaðalfundar. Á eykaaðalfundinum kann slíkt uppskot verða samtykt við minst 2/3 av teimum atkvøðum, ið eru umboðaðar á fundinum, sjálvt um ikki helvtin av limunum er á fundi.

**Stk. 2.** Felagið kann verða tikið av við aðalfundarsamtykt, men einans tá ið minst 2/3 av samlaðu atkvøðunum í felagnum atkvøða fyri. Uppskot um felagsins avtøku má tó verða lýst fyri limunum eins og uppskot um lógarbroyting.

**Stk. 3.** Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins at nýta til frama fyri vinnuliga menning, soleiðis sum aðalfundurin tekur avgerð um.

## SJÓVINNUFELAGIĐ


Adressa
Óðinshædd 7
Postboks 1038

Telefonnummar
309900

Fartelefon
739907

Teldupostur
mortan@industry.fo

Heimasíða
www.industry.fo


